# BR maðurin vitjar í BR

**Í leikuhandlinum BR merkist væl, at summar er í hondum. Og um vikuskiftið fáa tey forvitnisliga vitjan í BR**


HANDIL

Dagfinn Olsen

dagfinn@sosialurin.fo


Leikuhandilin BR í Havn er óivað størsti leikuhandil í Føroyum.

Í BR merkist væl, hvør árstíðin er, og í løtuni royna tey at fáa øll børn út at spæla, og nógv verður selt av t.d. rennifjalum, rulluskoytum og trampolinum.

## Summar

Summarið setir dám á, og eisini slíkt sum krit, hoppibond, spannir og spakar teljast millum leikurnar, ið merkja gerandisdagin í BR.

Árstíðin setir dám á søluna, og um veturin eru tað eittnú telduspølini, ið eru væl umtókt. Men hóast summar er í hondum, og veðrið er gott, so slepst ikki heilt undan, at slík spøl eru høgt í metum alt árið, og ikki bara um veturin.

## Forvitnisliga vitjan leygardagin

Í BR gleða tey seg í hesum døgum, tí leygardagin fáa tey forvitnisliga vitjan.

Tá kemur BR maðurin at vitja í handlinum á Hálsi, og hann leggur ikki so ofta leiðina framvið.



Í BR gleða tey seg í hesum døgum, tí leygardagin fáa tey forvitnisliga vitjan. Tá kemur BR maðurin at vitja í handlinum á Hálsi. Hann vitjar handilin klokkan 12:00 og klokkan 14:00, og tá eru øll børn vælkomin at koma í BR at heilsa uppá BR manin

Men leygardagin kemur hann at vitja klokkan 12:00 og klokkan 14:00, og tá eru øll børn vælkomin at koma í BR at heilsa uppá BR manin.








SUMMARKAPPINGIN '09

Lýsing hvønn dag til og við 26. juni.
Ring og hoyr nærri á 34 18 00

Sosialurin

Tel. 34 18 00 · lysing@sosialurin.fo · www.sosialurin.fo

